# Hetta merkir umskipanin á dagstovnaøkinum

Klaksvíkar Býráð samtykti á fundi 31. oktober 2018, at Fjallafípan verður víðkað við einum skála afturat. Hetta merkir samstundis, at Gerðastova verður niðurløgd, og at býtið á dagstovnaøkinum sum heild verður umskipað nakað. Víst verður til tíðindaskriv dagfest 31. oktober:

https://www.klaksvik.fo/news/3932/dagstovnaokid-verdur-umskipad

Broytingin er í tráð við ætlanina hjá kommununi um at veita øllum 6-7 ára gomlum møguleika fyri at ganga eitt ár í útibarnagarði, áðrenn tey fara í skúla. Hendan ætlanin er grundað á námsfrøðiligu vitanina um, at útibarnagarðstilboð er mennandi og stimbrandi fyri heilsuna og trivnaðin hjá børnunum. Staðsetingin og karmarnir í Fjallafípuni geva børnunum góðar møguleikar fyri at forvitnast og mennast, bæði í mun til læring og rørslu av fínari og grovari slag.

Broytingin gevur samstundis børnunum møguleika fyri at savnast og læra hvønn annan at kenna og menna sosialar førleikar saman, áðrenn tey seinni skulu í skúla saman. Harafturat gerst grundarlagið fyri samstarvi millum dagstovn og skúla til frama fyri børnini betri og smidligari við tað, at allur árgangurin er savnaður á sama stovni.

Niðanfyri verður greitt frá, hvussu broytingarnar ávirka ymsu stovnarnar í kommununi, og lagt verður eisini upp til kunningarkvøld/foreldrafundir á hvørjum stovni sær, sum leiðararnir skipa fyri.

**Fjallafípan:**
Framyvir verða øll tey 6-7 ára gomlu í Klaksvíkar kommunu savnaði í Fjallafípuni. Skiftistíðin inniber, at tey fimm ára gomlu, sum í løtuni hava pláss í Fjallafípuni, vera verandi á stovninum, inntil tey koma í skúlaaldur. Hereftir verður stovnurin bert fyri elsta árganginum á dagstovnaøkinum.

**Barnahúsið Margit:**
Børn í Barnahúsinum Margit fara framyvir at ganga í Barnahúsinum eitt ár longur enn áður. Broytingin kemur í gildi á sumri 2020, og tað merkir, at øll børn, sum eru fødd í 2014 fara út í Fjallafípuna á sumri 2019, sum gjørt hevur verið frammanundan.

**Mylnuhúsið:**
Í samband við nattúrliga skiftið, sum er um summarið, tá børn fara í skúla, verður Gerðastova niðurløgd. Tá fara elstu børnini úr Gerðastovu og Útistovu í skúla, og hini fara í Fjallafípuna.

**Dr. Margretha:**
Elsti árgangurin í Dr. Margrethu barnagarði (sum nú er í Stórustovu), fer framyvir í Fjallafípuna at ganga seinasta árið, áðrenn tey fara í skúla. Hendan broytingin kemur í gildi á sumri 2020.

**Blákollan**
Børn í Blákolluni fara framyvir at ganga í Blákolluni eitt ár longur enn áður. Broytingin kemur í gildi á sumri 2020, og tað merkir, at øll børn, sum eru fødd í 2013 og 2014 fara út í Fjallafípuna á sumri 2019, sum gjørt hevur verið frammanundan.

**Dagrøktin**
Dagrøktarskipanin er bert til børn í aldrinum 0-3 ár, og tí fáa nevndu broytingar neyvan nakra beinleiðis ávirkan á virksemið og plássini í dagrøktarskipanini.

*Vinarliga*

*Jógvan Skorheim*
*borgarstjóri*

*Sigrun Vágstún*
*barnaansingarsamskipari*